# Jú, John »Faxe« kann raka málið

**PREMIER LEAGUE** Manchester United og Arsenal tykjast vera bestu boðini upp á ein komandi meistara, ein kvinnuligur linjuverji kom í fokus orsaka av viðmerkingum hjá frásøgumonnum og bretar hava gloymt, at John »Faxe« Jensen faktist kann skjótt mál á hægsta stigi

Tróndur Arge – Liverpool

Dimitar Berbatov og Robin Van Persie skoraðu hvør sítt hattrick fyri ávíkavist Manchester United og Arsenal, og nú tykjast tey bæði verða bestu boðini upp á meistaraheitið. Dimitar Berbatov skeyt trý av málunum í 5-0 sigrinum á Birmingham á Old Trafford. Ryan Giggs og Nani skutu hini bæði málini. Dimitar Berbatov hevur nú skotið trý hattrick í hesum kappingarárinum. Hann skoraði øll málini fyri Manchester United, tá teir vunnu 3-2 á Liverpool, umframt at hann skoraði trý av málinum, tá Manchetser United vann heili 7-1 á Blackburn. Tað eru bara Dimitar Barbatov, Alan Shearer og Ruud van Nistelrooy, ið hava megnað at skorað trý hattrick í einum og sama kappingarári í Premier League.



Robin van Persie

## Arsenal bjóðar av

Robin van Persie skoraði øll trý málini fyri Arsenal í 3-0 sigrinum á Wigan á Emirates. Hann brendi harumfram eitt brotsspark, og hann hevði fleiri aðrar møguleikar í dystinum. Arsenal burdi vunnið dystin við fleiri málum. Manchester City tapti fyri Aston Villa og tí hevur Arsenal lagt seg á annað plássið og tykist vera størsta hóttanin hjá Manchester United í ár. Fyrrverandi Arsenal-miðvallarin, Paul Merson, sum eisini er SkySports viðmerkjari, segði í sending um vikuskiftið, at hann metir Arsenal vera favorittar at vinna Premier League í ár. Hann helt fyri, at Arsenal hevur lættari dystir enn Manchester United tað, ið eftir er av kappingarárinum.

## SkySport ger grin við kvinnuligum linjuverja

Tað er heldur sjáldsamt, at kvinnur eru á vøllinum í Premier League, men um vikuskiftið var 25-ára gamla Sian Massey annar av linjuverjunum, tá Liverpool vitjaði Wolverhampton. Richard Keys og Andy Gray, sum eru frásøgumenn hjá SkySports, hildu lítið um tað avgerðina hjá enska fótbóltssambandinum. Teir hildu at ongin hoyrdi teir, tá samrøðan niðanfyri fór fram undan dystinum:

– Kann onkur fara oman á vøllin og læra hana reglarnar um rangstøðu, er Richard Keys ákærdur fyri at siga.

– Hevði tú trúð tí? Ein kvinnuligur linjuverji. Kvinnur duga ikki regluna um rangstøðu, svaraði Andy Gray eitt sindur seinni.

– Sjálvandi gera tær ikki tað. Eg ivist ikki í, at hon ger eit stórt mistak í dag, og Kenny Dalglish (venjarin hjá Liveproól, blðm.) verður í øðini. Høvdu vit ikki ein kvinnuligan linjuverja herfyri?, svaraði Richard Keys aftur, og vísti til, at ein kvinnuligur linjuverji hevur verið á vøllinum í Premier League fyrr í hesum kappingarárinum.

Hendan samrøðan hevur skapt øsing í enskum miðlum. The Mail on Sunday hevur sett seg í samband við Richard Keys og spurt hann um samrøðuna. Richard Keys segði seg ikki minnast nakað til samrøðuna.



John »Faxe« Jensen, hjálparvenjari hjá Blackburn



Dimitar Berbatov skeyt enn eitt hattrick í stórsigrinum móti Birmingham

## » Kann onkur fara oman á vøllin og læra hana reglarnar um rangstøðu

## Hon dugur rangstøðu regluna

Tá Liverpool legði seg á odda í dystinum, vildu Wolverhamponleikarnir vera við, at ein Liverpool-leikari var rangstaddur í uppspælinum. Sjónvarpsupptøkurnar vístu tó, at Sian Massey gjørdi púra rætt í ikki at koyra flaggið upp fyri rangstøðu, og vísti har við Richard Keys og Andy Gray, at hon ongar trupulleikar hevur av regluni um rangstøðu.

Fleiri miðlar hava víst sín stuðul til Sian Massey og millum annað enski liðskiparin, Rio Ferdinand, hevur á síni Twitter-síðu skrivað, at hann ongar trupulleikar hevur av at kvinnur døma í Premier League.

## » Eg var har tá John Jensen skoraði!

## Hetta er ikki fyrstu ferð

Richard Keys spilti í 2007 Svangaskarð út, tá hann helt at mikrofonin var sløkt. Tað var undan heimadystinum hjá føroyska landsliðnum ímóti Skotlandi, at Sky Sport verturin segði ov nógv.

– Silly ground, stupid game, f*** off, segði Richard Keys í mikrofonina, ið hann helt verða sløkta.

Hann segði eisini ov nógv, tá Arsenal fyri nøkrum árum síðani spældi móti Barcelona í Champions League.

– Reist teg upp tín tápuligi smádrongur. Tú hevur einki nyttað í tínum tápuligu ljósareyðu fótbóltsskóm – fullkomuliga hopuleysur, segði hann um avrikið hjá Theo Walcott í dystinum - óvitandi um at mikrofonin var tendrað.

## John »Faxe« dugur at skjóta

John »Faxe« Jensen er nýggjur hjálparvenjari hjá Blackburn, sum fyrr í hesum kappingarárinum varð keypt av indiskum ríkfólki. Eftir, at Danmark vann EM í 1992 var John »Faxe« seldur til Arsenal frá Brøndby. Danski miðvallarin spældi 97 dystir og gjørdist kendur fyri IKKI at raka málið tá hann skjeyt. Tað gekk so illa hjá honum, at Arsenal viðhaldsfólkini gjørdu til vana, at rópa »SKJÓT« hvørja ferð John »Faxe« fekk bóltin.

Í fýra ár megnaði hann bara at skora eitt mál fyri Arsenal. Tað var við frálíkum skoti móti QPR 31. desembur 1994. Arsenal tapti dystin 3-1, men søgan sigur at aldrin hevur lagið verið so gott millum Arsenal viðhaldsfólk og eftir dystin kundi tú keypa T-Shirtir við áskriftini:

»Eg var har tá John Jensen skoraði!«

Tí hava viðmerkjarar í Onglandi gjørt eitt sindur grin við John »Faxe«, nú hann er settur sum hjálparvenjari hjá Blackburn. Skemtiligu viðmerkingarnar ganga út upp á, at hann er settur til at taka sær av skotvenjing.

Tað sum bretar kanska hava gloymt er, at John »Faxe« Jensen faktist skoraði í EM finaluni í 1992 móti Týsklandi, og tað var enntá við einum dundur skoti! Ongin breti hevur nakrantíð skorað í eini EM finalu, tí so langt eru teir ongantíð komnir!

trondur@sosialurin.fo